tilbygningur og upprunahús sampakka í allar mátar.

Tað kann sjálvsagt setast spurnartekin við hetta ráðstevnuvirksemið, sum hevur vundið uppá seg í húsinum, og vit hava varhugan av, at serstakliga í listafólkaumhvørvi er hetta ikki heilt væl dámt. Hinvegin hevur stovnurin ein støðugt vaksandi tørv á inntøkum, so vit halda hetta vera gott, so leingi tað ikki nervar tann mentanarliga partin av virkseminum. Hartil kemur, at ráðstevnurnar hava ein serstakan týdning í strembanini eftir at gera Føroyar kendar úti í heimi. Í hesum høpi er Norðurlandahúsið sera væl hóskandi við tað, at húsið bergtekur gestin frá tí hann setur sín fót inn um dyrnar. Nú vaksið er um plássið í húsinum, skuldi ráðstevnvirksemið eingin trupulleikin verðið í framtíðini, og víðkanin skuldi, alt annað líka, eisini gjørt umstøðurnar hjá listafólkunum betri. Her er vert at hava í huga, at Ráðharraráðið hevur í avrikssáttmála álagt húsinum at leggja serstakan dent á mentanarlig og listarlig tilboð til børn og ung og kemur víðkanin sostatt væl við í hesum sambandi.

Tað er Norðurlendska Ráðharraráðið, sum saman við Føroya Løgtingi og privatum grunnum hava játtað ella fara at játta tann pening, ið uppíbyggingin, Athøll, kostar. Undanfarna samgonga verður mangan lastað fyri ikki at hava gjørt nóg mikið fyri mentanina, men tann samgongan og ikki minst Jógvan á Lakjuni sum landsstýrismaður í norðurlandamálum og í mentamálum, eigur sín part av æruni av, at uppíbyggingini av Athøll til Norðurlandahúsið kundi fremjast í verki. Skal nakar annar nevnast í hesum høpi má tað verða stjórin Niels Halm, ið á øllum mótum hevur arbeitt ótroyttiliga fyri nýggja bygninginum.

Nú verður so tjúgfimmára dagurin hildin við stórfingnum mentanartiltøkum og hetta er húsinum uppiborið. Norðurlandahúsið er vorðið ein ómissandi partur av okkara almenna lívi og av okkara samleika. Húsið hevur ómetaligan týdning fyri føroyska mentan og list og lýkur ein stóran tørv. Hartil kemur, at húsið í roynd og veru hevur prógvað, at tørvur framvegis er á einum nýggjum føroyskum tjóðleik- og tónlistahúsi til at hýsa allari føroyskari pallist. Sostatt nøktar Norðurlandahúsið, so gott tað enn er, ikki allan tørvin, og tað skal húsið heldur ikki gera. Norðurlandahúsið eigur ikki at taka ta ábyrgd á seg, sum liggur á okkum – hesa ábyrgd eiga vit, løgting, landsstýri og føroyski almenningurin. Vit ynskja Norðurlandahúsinum og allari tjóðini hjartaliga tilukku á tjúgufimm ára merkisdegnum.

Sosialurin

# Livandi prógv um vinalag



Føroyingar eru norðurlendsk tjóð og norðurlendski samleikin millum føroyingar er sterkur. Hóast vit av formligum orsøkum enn ikki hava fullan limaskap í norðurlendska politiska samstarvinum, so taka vit fult og heilt lut í mentanarsamstarvinum. Alla staðir, har vit møta í norðurlendskum samstarvi, tað verði seg politiskt ella mentanarligt, kenna vit okkum vælkomin.

Í øllum norðurlenskum høpi møta vit stórum tokka og ektaðum og livandi áhuga fyri landi, mentan og list okkara. Føroyingar hava fingið norðurlendskar virðislønir fyri listarlig avrik innan fleiri listagreinir. Hetta merkir, at vit ikki bert taka ímóti men, at vit hava eins nógv at geva okkara norðurlendsku brøðratjóðum og alheiminum.

Tað vakra og byggilistarliga meistarverkið í Gundadali er tí ikki bert ein stórfingin bróðurlig gáva frá Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum til Føroya fólk og til hinar norðurlendsku tjóðirnar. Norðurlandahúsið er eisini eitt livandi prógv um vinalag millum brøðratjóðir og eitt prógv um tann stóra týdning, sum mentan og list hava fyri okkum menniskju. Tað er tí ikki av tilvild, at mentanarsamstarvið er ein hornasteinurin í samstarvinum millum norðurlendsku tjóðirnar.

Tað er torført við orðum at lýsa tann stóra týdning, ið Norðurlandahúsið hesi 25 árini hevur havt fyri okkum føroyingar. Húsið er vorðið savningarstaðið hjá okkum. Her hava fólk fingið listarligar upplivingar fyri lívið, her hava verið altjóða ráðstevnur og fundir, sum hava flutt mørk og sett Føroyar á heimskortið. Her hava verið tiltøk og samkomur, sum hava savnað fólk úr øllum landinum. Í húsinum hava verið ógloymandi løtur, har okkara egnu listafólk innan vakrar og tignarligar karmar hava fingið høvi at vísa landsmonnum, hvat tey duga og megna. Í húsinum hava Norðurlond givið okkum tað besta, ið tey kunnu bjóða. Húsið er tí ein fongur og ein stoltleiki fyri alt Føroya fólk.

Norðurlandahúsið er eisini við at gerast eitt aktiv og ein sterkur pallur hjá føroyingum í sambandi við tær avbjóðingar og teir møguleikar, sum altjóðagerðin gevur okkum. Í hesum høpi hevur víðkanin av húsinum serstakan týdning, og vit eru Norðurlanda Ráðharraráðnum sera takksom fyri tað álit og stórtøkni, sum her er víst okkum – sama vælvild og sami tokki sum fyri tjúgufimm árum síðan.

Vegna landsstýrið takki eg Norðurlandahúsinum fyri farnu tjúgufimm árini og ynski húsinum, stýrinum, starvsfólkum, brúkarum og øllum Norðurlondum hjartaliga til lukku við ynskinum um, at húsið eisini í framtíðini skal megna at virka til gleði og gangs fyri allar norðurlendsku tjóðirnar og annars øll, sum leita hendan vegin at kunna seg við okkum í Útnorðri.

*Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

# 25 ár við ógloymandi løtum

Spennandi løtur. Stuttligar løtur. Álvarsamar løtur. Lærandi løtur. Mennandi løtur. Ógloymandi løtur.

Í 25 ár hevur Norðurlandahúsið nú verið karmur um ómetaliga nógv tiltøk, ið hava givið okkum hópin av minniligum løtum. Løtum, sum hava verið við til at givið okkum eitt meira ríkt, livandi og spennandi samfelag.

Norðurlandahúsið var eitt ómetaliga stórt frambrot fyri føroyska mentanarlívið og samfelagið, tá hetta gjørdist veruleiki fyri 25 árum síðan, og hevur týðandi leikluturin hjá Norðurlandahúsinum hildið áfram og vaksið øll árini. Úrslitið er hópurin av skapandi og mennandi virksemi, sum í dag røkkur út í helst øll heim í Føroyum. Virksemi, ið flytir mørk, hugtekur og byggir brýr til onnur lond.



Prix Føroyar, sangleikirnar Jósef, Ronja Ránsmannadóttir og Fame, Ung í Føroyum, symfonikonsertir, operakonsertir, listastevnur, sjónleikirnir Antigone og Glataðu Spælimennirnir, føroyskur dansur, AME, altjóða ráðstevnur og Listaleypurin eru nøkur fá dømi millum mongu ríkandi tiltøkini, ið hava spírað og blómað í Norðurlandahúsinum.

Tað er at fegnast um, at ikki bert tiltøkini, men eisini sjálvt húsið, gerast alsamt størri í vavi. Nýggi tilbygningurin, fer at geva Norðurlandahúsinum møguleika fyri at húsa enn meira skapandi og mennandi virksemi. Hetta fer at verða til stórt gagn fyri øll tey, ið fara at nýta hetta týðandi húsið komandi mongu árini.

Sjálvt Norðurlandahúsið er ein ómetaliga vakur og góður karmur um tað virksemi, ið húsast í húsinum. Ein byggilistarlig perla. Ein ímynd av norðurlendska samstarvinum.

Tað eru tó tey mongu fólkini, ið seinastu 25 árini hava fylt húsið við lívi og virksemi, ið hava gjørt Norðurlandahúsið til tann týðandi leikaran í føroyska samfelagnum, sum tað hevur verið. Ongin nevndur, ongin gloymdur. Avbera nógv eru tey, ið hava lagt nógva tíð og orku í, ótalligar framsýningar, framførslur, konsertir, ráðstevnur og tiltøk, ið hava hava ríkað Føroyar, og í fleiri førum hava sett Føroyar á heimskortið.

Stóra tøkk til tykkum mongu, ið hava gjørt skapandi virksemi og minniligar løtur til veruleika í Norðurlandahúsinum seinastu 25 árini.

Um farnar løtur í Norðurlandahúsinum bera boð um, hvat vit kunnu vænta í framtíðini, so kunnu vit øll gleða okkum til nógvar ógloymandi løtur komandi árini.

Hjartaliga tillukku.

*Kristina Háfoss*
*landsstýriskvinna í mentamálum*